# Fólk søkist

Fólk søkist at arbeiða nakrar tímar um vikuna í klædnahandlinum Seytjan á Áarvegnum.

Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða arbeiðssom og fyrikomandi.

Skrivlig umsókn verður at senda innan 16. okt. til:

**Seytjan**
**Áarvegur 12**
**100 Tórshavn**

Seytjan

Áarvegur 12 • 100 Tórshavn • Tel. 311305 • Fax 311304
E-mail: seytjan@post.olivant.fo

Sosialurin 311820



# Drama

Kvøldskúlin og Fuglafjarðar Sjónleikarafelag skipa fyri skeiði í drama

**20. og 21. oktober**

Lærari: Hjørdis Johansen.

Tekning á tlf. 445115.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**tlf. 444087**



# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



JÁSPI KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



**Vegna skeiðvirksemi er mekaniska verkstaðið hjá Ford, Akranesgøta 5, stongt 10. og 11.okt.**

**P/f Wenzel**

Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • tel. 313874/ fax 311173
www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820



# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



# Timburmenn

Søkt verður eftir 10 dugnaligum timburmonnum til arbeiði í Noreg beinanvegin. Góð løn + akkord, frían bústað.

**Ring til Fritleif tel. 318090**
**ella Tórálvur tel. 0047 97090510**



ELEKTRON

Spennandi starv í Kundatænastuni

Arbei›suppgávurnar, i› er sera fjølbroyttar og avbjó›andi, fevna í høvu›sheitum um kundatænastur og at ver›a vi› til at royndarkoyra n‡ggjar skipanir og sleppingar av skipanum hjá Elektron. Vi›komandi kemur eisini at ver›a partur av Test- og gó›skueftirlitsbólkinum á Elektron.

**Av tær vænta vit:**
- at tú hevur útbúgving sum peningastovnsfólk
- at tú hevur gó›an kunnleika til Avgrei›sluskipanina og 3270 skipaninar á Elektron
- at tú ert fyrikomandi og hevur gó› samstarvsevnir
- at tú arbei›ir sjálvstø›ugt

**Vit bjó›a:**
Eitt sjálvstø›ugt starv vi› gó›um møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Tann, i› ver›ur settur í starvi› fær ávirkan og møguleikan at hækka tænastustø›i og gó›skuna sum heild á Elektron

Nærri uppl‡singar um starvi› fáast vi› at venda sær til lei›aran á Kundatænastuni, Jógvan Olsen á tel 314505, lok. 120.

**Umsókn**
Umsóknin, i› skal ver›a okkum í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2000, skal sendast til:

P/F ELEKTRON
Staravegur 9
Postboks 219

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

**P/F Elektron er størsta KT-fyritøka í Føroyum, vi› umlei› 55 starvsfólkum og einum nettoumsetningi í 1999 uppá umlei› 40 mió. kr.**

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum vi›urskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsst‡ri.

stephanssons hús






Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591





**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

**Jimex Brenniovnar**
**Isokern Skorsteinsbjálving**
**Isokern Skorsteinselementir**
**Lúkur - Fuglaristir**
**Ventilar - Roykhattar**

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass




## Lesarabræv

# Hava øll átt eitt pláss



Sjálvan 14. september er ein oddagrein í Dimmalætting við heitinum: »Øll eiga eitt pláss«. Lat meg skunda mær at siga, at hetta taki eg undir við, eisini endnum á greinini: »Vit mugu ikki kasta okkara føðiland út í eljustríð, hatur og øvund.« Guð gævi, at Dimmalætting nú fer at liva eftir egnum orðum.

Hvør vann 14. september 1946? Og hvør stóð hjálpurt av dønum sum sigursharri. Fyri kortum skrivaði ein abbadóttir um abban, sum var koyrdur frá. tí hann tosaði føroyskt við føroysk børn í skúlanum. Hetta er ikki eindømi. Hvør einasta ætt, sum hevur hoyrt til sjálvstýrisvongiin hevur sína søgu at siga.

Hvussu hava tey verið viðfarin alla hesa øldina, sum hava roynt at arbeiða fyri tí føroyska?

Nú er Dimmalætting bara eitt navn og broytist sjálvandi við teimum fólkum sum skriva og stjórna henni. Lat farið vera farið, tí eg kundi eisini sagt mína søgu um Dimmalætting.

Havi fyrr tikið upp eftir Sigurd Joesen, at hann býtti ikki føroyingar upp í kirkjufólk ella brøðrafólk, sambandsfólk ella sjálvstýrisfólk, fyri honum vóru allir føroyingar. Havi roynt at liva eftir hesum, meira ella minni væleydnað.

Eisini plagdi eg at minna á, at vit øll eiga rvær ommur og tveir abbar, sum ikki so sjálvdan drógu hvør sína línu í sjálvstýrismálinum.

Tað eru tveir partar í hesum máli, tað má oddagreinaskrivarin ikki gloyma. »At sáa iva um føðilandsgóðskuna í samband við politiskt tjak er ófyrigeviligt og landaskaðiligt.«

At lesa ein tílíkan setning í Dimmalætting gleðir meg, og tað eg nú skrivi, siti eg ikki av beiskleika ella fyri at ilneitast og brigslast.

Aftaná kríggj komu nógvir føroyingar heim, flestu teirra uppald á bygd, men tey vóru skírd asfaltføryingar, altso ikki rættir føroyingar. Allur tjóðveldisflokkurin var kommunistiskur og vildi sleppa at tæna Sovjet, og javnt settur við landasvíkjarar.

Sjálvur var eg eisini skírdur kommunistur og tí ikki rættur føroyingur.

Aftur fyri, at eg hevði lært í Danmark (eri føddur, meðan Føroyar var eitt reint danskt amt), skuldi eg ikki hava loyvi til at hava eina politiska meining. Haraftturat var eg lærari, og tá danir goldu nakað av læraralønini, skuldi eg bara tiga um føroysk samfelagsmál. Hetta var júka, eisini tey árini eg var á háskúla, og júkarnir vistu, at háskúlin var reint føroyskur. So seint sum í hesum árinum hevur tú kunnað lisið tílikt. Og Høgni Hoydal sum er úr ættarliðnum hjá mínum børnum, hann skal eisini makka rætt, t.v.s. hava somu meinig sum sambandsflokkurin og javnarflokkurin. At hann eigur eina fitta danska ommu, sum hevur livað meðinpartin av lívinum her, verður eisini brigsla honum. Eisini at hann hevur lært í Danmark, er føddur har o.s.fr. Altso ikki rættur føroyingur.

Tað tænir ongum endamáli at halda framvið at reksa allan órættin upp, sum minnilutin í Føroyum, sjálvsstýrisfólkið, hevur liðið undir av einum meiriluta, sum bert var ein meiriluti, tí teir vórðu hjálptir av aðrari tjóð.

Føroyingar kunnu nústani byrja so dánt at lesa eitt sindur um sína egnu søgu tí »føðilandsgóskan« hjá summum føroyingum var vorðin skift út við egingóðskuna.

Lønin var ofta feit størv. Skuldi tú skriva søguna fullu langir myrkir skuggar á føroyingar, sum høvdu verið nógv frammi og havt stórt vald. Men tíðin fer eisini frá teimum. Hvør tosar um tey, sum vóru ímótu fólkastýrinum t.d. Eingin águgi kann nú vera fyri fólki, sum í sínari tíð av øllum alvi bardist móti føroyska málinum, flagginum og vóru fyri at vit skuldu verða eitt amt. Hesi fólk vera við tíðini bert nevnd í eini klombru. Um tey gingu í føroyskum klæðum ella ei og ótu skerpikjøt, dansaðu føroyskan ella enskan dans. Eingin spyr um tað. Sjálv søgan fer framvið teimum, hvussu so søgufrøðingarnir spenna seg út. »Tínar gerðir og gerningar døma teg, ikki eg«

**Steinbjørn B. Jacobsen**

## Viðmerking

# Tey gomlu og býlini



Gravgangurin er vísur eftir plássi á Lágargarði og Ellisheiminum, so títt og knapt útvarpið hevur lýst andlát og jarðarferð hjá einum, sum hevur havt innivist har.

Tað er væl skiljandi, at avvarðandi at teimum, sum hava fyri neyðini at koma á slíkan stovn, eru nærum desperat í síni leitan eftir innivisti, men tað er bæði óvirðiligt og mannminkandi, at neyðugt er at brúka snildir og knep fyri at sleppa upp í part.

Tað eru heldur ikki øll, sum vilja ella troysta sær at taka lut í hesum mangan óverduga leiki.

Men gongdin og gravgangurin eru besta prógvið um, at ansingar- og røktarpláss til eldri og óhjálpin er ein stór trotvøra í Tórshavnar Kommunu.

Ellisheimið var eitt stórt framstig í sínari tíð og Lágargarður ikki minni, tá hann kom, men her krevst upp aftur meir, og kommunan má ganga á odda. Tí tað er vælveruna hjá hennara borgarum, hetta snýr seg um.

Ført verður fram, at kommunan hevur ongan myndugleika á økinum, og tí slepst so stutt í hesum tíðum við lofti yvir íløgunum.

Um so er, so er stundin komin at broyta hesi viðurskifti, tí kommunurnar kunna ikki bara hyggja at, meðan summir av teirra íbúgvum liva sítt lívskvøld í treða og einsemi.

Kommunurnar hava yvirtikið barnaansingina, og onki er meiri náttúrligt enn, at tær eisini taka upp á seg at stíla fyri ansing og røkt hjá teimum gomlu, sum eru blivin óhjálpin.

Kommunan eigur jú sín stóra og sjálvsagda part av ábyrgdini fyri okkum og okkara umstøðum úr vøggu í grøv.

Í fyrstu atløgu kann landsstýrið fáa gongd á nevndararbeiðið um innihaldið í eldrarøktini í framtíðini, sum stígur kom í hendan dagin, og skunda undir broytingarnar í býtinum millum landið og kommunurnar.

Fyrrenn tað arbeiðið er fingið frá hondini, hendir so onki, sum munar.

**Jógvan Arge**
**valevni tjóðveldisfloksins til býráðsvalið í Havn**

## Valevnislisti Sjálvstýrisfloksins

### til býráðsvalið í Tórshavn 21. nov. 2000

Sólborg Dulavík, fyristøðukvinna, Kráargøta 3, Argir
Inga Foldbo Hjallnafoss, marknaðarfólk, Eiriksgøta 12, Tórsh.
Eiler Johannesen, skrivstovumaður, Turiðargøta 20, Tórshavn
Jónas Johnsson, fysioterapeutur, í Sundinum, Kollafjørður
Noomi Juul, handilskvinna, Dalagøta 22, Tórshavn
Ása Olsen, fakfelagsleiðari, Berjabrekka 193, Tórshavn
Ronald Poulsen, býráðslimur, Turiðargøta 27, Tórshavn
Tórbjørn Poulsen, verkfrøðingur, Bóndabrekka 21, Tórshavn
Torkil Skála, lærari, Dalavegur 4, Tórshavn

## Viðmerkingar

# Bíligari mjólk og breyð

*- Tað er skattalætti ið munar*



Tað skal gerast bíligari at vera føroyingur. Serliga skal hetta koma teimum til góða, sum ikki hava ta stóru inntøkuna. Tað sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

Hetta ætlar hann at gera m.a. við at strika øll undantøkini í MVG-skipanini, soleiðis at meirvirðisgjald verður lagt oman á allar vørur.

Niðurstøða landsstýrismannsins av avleiðingini er, at tá ber til at lække meirvirðisgjaldið á øllum vørum.

Hvussu hetta serliga kemur teimum lágløntu til góða, - teimum mest fíggjarliga fyrispentu, dugi eg ikki at skilja. Tá hevði verið frægari, at havt eitt lægri meirvirðisgjald á vanligu og dagligu húsarhaldsvørurnar, og hægri gjald á vørur, sum tey meira vælbjargaðu – teimum, sum hava ráð at hava kræsnar gómar – kunnu loyva sær at keypa.

Annað dømi um fíggjarmálaráðharrans serliga tokka til til lágløntu, er at samgonga hansara feldi uppskotið um at lække oljuavgjaldið. Sambært Sosialin sigur landsstýrismaðurin, at eitt lægri oljuavgjald hevði serliga komið teimum til góða, sum frammanundan eru væl fyri og brúka nógva olju.

Ikki rokni eg við, at nakar brúkar meira olju enn neyðugt er. Men tað er hinvegin hjá mongum familjum neyðugt at brúka meira olju enn hjá øðrum familjum. Har nógv eru í húsi, barnaríkum familjum, sum frammanundan hava tungt hús. Heldur ikki skili eg í hesum føri hvussu hugsan landsstýrismansins kemur teimum veikaru til góða.

Tá talað verður um tey, sum ikki eru so væl fyri fíggjarliga, verður altíð hugsað um inntøkuna og ikki neyðuga nýtslu hjá húsarhaldinum. Skattastigin er tí ikki í øllum førum rætta amboðið at lætta um hjá teimum, sum eru ringast fyri fíggjarliga. Minni enn so. Annað er so tað, at fáur man longur rokna við einum skattalætta sum munar.

Tí eitt ítøkiligt og einfalt uppskot at hjálpa teimum sum veruliga tørva fíggjarligan lætta: Latið eitt munagott ískoyti til mjólk og breyð! Tað munar á røttum stað. Hetta kundi verið ein hjálpandi hond frá landspolitikarunum. Og frá kommunalpolitiskari síðu, har eingin møguleiki er fyri laga skattin eftir inntøku, eiga vit at hækka barnafrádráttin.

**Tórfinn Smith,**
**býráðslimur**

*Tíðinaskriv frá Ferðslutrygd*

# Tørvandi nummarspjøldur

Fólk, serliga í Havnini, finnast at, at tey illa fáa boðað frá ólógligari prutlkoyring, tí øll prutlini tykjast rættiliga eins, og eingi frámerki eru longur á prutlunum, so tey kennast ikki at. Spurt verður, hví prutlini ikki hava nummarspjøldur longur. Til tað er at siga, at tey spjøldrini, prutlini høvdu, vóru tryggingarspjøldur, latin av Tryggingarfelagi Føroya, og ikki av Bileftirlitinum. Síðani Tryggingarfelagið gavst at nýta hesi spjøldur hava prutlini eingi frámerki havt. Løgreglan upplýsir, at tað hevði verið ynskiligt við nummarspjøldrum.